# Bygdaráðsfundur

## Bygdaráðsfundurin 08.11.2010

**Mál nr. 136/2010 skúlamál.**
J. nr. 2010-0011-0021
Játtanin til Musikkskúlan fyri skúlaárið 2010/2011 er minkað. Skerjingin gongur út yvir vikararnar í skipanini. Við tað at ófaklærdir lærarar eru til guitarundirvísingina, verða teir spardir burtur.

Hetta gongur út yvir nógvar guitarnæmingar í Musikskúlanum og er hetta sera óheppi.

Við hesum verður søkt um at fáa eina eykajáttan áljóðandi kr. 20.000,00 til guitarundirvísingina fyri várið 2011.

Mentanarnevndin mælir til, at Nes kommuna rindar sín part, sum er ca. 25,3% av teimum 20.000 kr. til undirvísing fyrra hálvár 2011.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og er peningurin avsettur á fíggjarætlanini fyri 2011.

Avgerð: Tilmælið frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 138/2010 Trivnaðarmál**
J. nr. 2010-0031-0079
Avgerðin hjá Kærunevndini viðv. kæruni hjá Nes kommunu um skerdan stuðul til umsorganararbeiðið í kommununi fyriliggur nú, og er hon tann, at avgerðin hjá Nærverkinum verður staðfest.

Trivnaðarnevndin tók hetta til eftirtektar.

Avgerð: Bygdaráðið tók tilmælið til eftirtektar.

**Mál nr. 140/2010 Dagrøktarmál**
J. nr. 2010-0031-0104
Vaskifólkið í Spælistovuni hevur verið í farloyvi, og ynskir ikki at byrja aftur í starvinum. Kommunan hevur í hesum tíðarskeiðið havt avloysara.

Leiðarin spyr, um starvið skal lýsast leyst, ella avloysarin heldur fram.

Trivnaðarnevndin mælir til, at starvið við hesum verður lýst leyst at søkja.

Avgerð: Tilmælið frá Trivnaðarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 141/2010 Brunamál**
J. nr. 2010-0005-0001
Brunasamtyktin skal endurskoðast 5. hvørt ár.
Brunanevndin hevur á fundi 28.09.2010 viðgjørt brunasamtykt frá 2005.
Hon kom til tað niðurstøðu, at einasta broytingin er, at Funnings kommuna verður strikað, sum sjálvstøðug kommuna.

Tekniska nevnd mælir til at taka undir við uppskotinum frá Brunanevndini.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 142/2010 Byggimál**
J. nr. 2010-0042-0278
Hin 13.10.2010 søkir Verkflex um grundøki til ein minni vinnubygning í Oyrunum

Tekniska nevnd mælir til at hava fund við Verkflex um ætlanina.

Tekniska nevnd mælir til at beina málið aftur í Teknisku nevnd.

Avgerð: Bygdaráðið samtykti einmælt at koyra málið aftur í Teknisku nevnd til viðgerðar.

**Mál nr. 143/2010 Jarðarmál**
J. nr. 2008-0048-0030
Hin 08.10.2010 sendir Búnaðarstovan, umsókn um grundstykkið til húsini á Sandi Mikla, til ummælis hjá Nes kommunu.

Tekniska nevnd mælir til, at geva sama svar sum higartil, t.e. at kommunan mælir frá at selja grundstykkið grundað á, at Toftavatn framvegis verður brúkt sum drekkivatn bæði hjá Nes- og Runavíkar kommunu.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 145 /2010 Byggimál**
J. nr. 2010-0042-0266
Tann 07.10 2010 søkja Rosa og Karl Martin Joensen um byggiloyvi til sethus á matr.nr. 669 aø við Gaddavegin.

Tekniska nevnd mælir til at játta Rosu og Karl Martin Joensen byggiloyvið til sethús, samb. tekningum dagf. 01.05.2010 eftir galdandi ásetingum í býarplaninum og viðvíkjandi plasering v.m. vera húsini sett samb. tekning frá Teknisku deild hjá Nes kommunu dagf. 19.okt.2010

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 146 Byggimál**
J. nr. 2010-0042-0279
Radiobúðin søkir um brúksloyvi av øki til mastur og tilhoyrandi húsi norðanfyri norðara vøllin á Svangaskarði.

Tekniska nevnd viðmælir brúksloyvið til mastur og skúr, treytað av at loyvi verður givið, av verandi eigara av lendinum.

Avgerð: Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 148/2010 Vegamál**
J. nr. 2010-0044-0034
Á seinasta bygdaráðsdfundu hin 07.10.2010 viðgjørdi bygdaráðið hetta málið og samtykti at tað skuldi koma fyri aftur á komandi bygdaráðsfundi, saman við tekningum og kostnaðarmeting av busskýlinum.

Mál nr. 125/20101 Vegamál.
Borgari spyr um málini Bussskýlið á Toftagjógv, Gøtuna niðan á Hamar og Trappuna frá Kneysum oman á landsvegin.

Tekniska nevnd mælir til, at hesi mál verða tikin við, tá fíggjarætlanin fyri 2011 verður viðgjørd.

Tekniska nevnd mælir til á fundinum, at málini viðv. gøtuni niðan á Hamar og Trappuna frá Kneysum oman á landsvegin, vera tikin við tá fíggjarætlanin fyri 2011 verður viðgjørd, meðan Tekniska deild skal gera eina tekning og kostnaðarmeting av, hvat eitt hóskandi Busskýlið kostar, og leggja hetta fyri bygdaráðið á komandi fundi .

Seinna tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Nú hevur Tekniska deild gjørt eina tekning av busskýlinum á Toftagjógv sum er 2,5 metur langt og 1,30 metur breitt, og eina kostnaðarmeting av hesum, sum er uppá 41.000,00 kr. (tilfar 23.000,00 kr. og arbeisðløn 18.000,00 kr.), og málið verður tí lagt fyri bygdaráðið samsvarandi fyrr gjørda samtykt.

Tekniska nevnd mælir til, at kommunan gerð busskýlið á Toftagjógv, samsvarandi uppskot nr. 1 frá Teknisku deild.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og at peningurin verður tikin av konto nr. 1521. “Ferðsluforingar”.

Avgherð: Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.